# Hinumegin heimin at

Einaferð vóru tað ein porkeningur, ein miðvingur og ein kollfirðingur sum skuldu halda jól á Hawaii... Nei tað er ikki skemt, men sannleiki. Hinumegin Heimin eru trý ung, føroysk fólk farin undir lesnað á Hawaii. Har fara tey eisini at halda eini heldur øðrvísi jól enn tey eru von við



## Fakta

- 15 fakta um Hawaii
- Hawaii hevur einaferð verið eitt kongaríki
- »The Aloha State« gjørdist statur nummar 50 í Sambandsríkinum Amerika í 1959.
- Oyggjarnar í Hawaii eita Kaua´i, Moloka´i, Ohau, Lana´i, Maui, og Big Island.
- Kaua´i er tann norðasta oyggin
- Høvuðsstaðurin í Hawaii, Honolulu, liggur á Ohau og tað ger Pearl Harbour eisini
- Moloka´i er tann mest Hawaiiska av oyggjunum
- Á Lana´i er ein strond ið eitur Shipwreck Beach. Har liggur eitt skipsvrak frá 40´árunum tætt við land
- Fleiri av strendunum á Maui sigast at verða millum heimsins bestu.
- Á Big Island er ein aktiv vulkan, Mauna Loa. Har er eisini kavi og møguligt at standa á skí, men hetta skal tó ikki viðmælast
- Hawaii er heimstaðurin hjá surfing og hula dansi
- Blomsturkransurin eitur ein Lei (úttalast ley)
- Aloha merkir bæði Góðan dag og farvæl
- 1,28 milliónir íbúgvar eru á Hawaii
- Hægsta punkt er 4205 metrar yvir havinum (Mauna Kea á Big Island)
- Hawaii er mest avbyrgdi fólkamiðdepilin í heiminum við umleið 2000 sjómílum til Kalifornia, 3300 sjómílum til Japan og 4250 sjómílum til Kina

Tíðliga í heyst fóru tríggir føroyingar undir eina langa ferð, har tey skuldu ferðast til eitt stað, ið neyvan kundi ligið nógv longri burtur frá heimlandinum, nevnliga tann 50. statin í Sambandsríkinum Amerika, Hawaii.

Tey, ið fóru avstað vóru Pætur Larsen, 24 ár og búsitandi í Havn, men uppvaksin í Porkeri, Joan Joensen, 27 ár og úr Kollafirði og Elsi Petersen, 27 ár og úr Miðvági.

Leiðin hjá hesum ungu fólkunum gekk til Honolulu, ið er høvuðsstaður í Hawaii, har tey øll nú eru lesandi á Hawaii Pacific University.

Joan og Elsi byggja víðari uppá sína serviceøkonomútbúgving sum tær hava tikið í DK og lesa sostatt á 3. árið ávíkavist Travel Industry Management, ferðavinnuleiðslu, og Human Resource Development, starvsfólkaleiðsla og -trivnaður, meðan Pætur lesur Entrepreneurial Studies, leiðslubúskap, á fyrsta árið.

Vit fingu orð á tey seinast í november mánaði tá tey so smátt vóru farin undir at fyrireika seg til høgtíðirnar, ið eru fleiri við tað at Thanksgiving verður hildið fjóðra hósdag í november í USA.

### Øðrvísi í allar mátar

Tað sum er mest øðrvísi við Hawaii er sambært Pæturi, Elsi og Joan uttan iva veðrið.

– Her er javnur temperaturur tað mesta av árinum, tó eru hitastigini nøkur stig lægri um veturin. Hesa tíðina av árinum eru eisini fleiri dagar har tað er yvirskýggja og tað regnar av og á. Eitt annað sum er nógv øðrvísi her enn í Føroyum er at her eru sera nógv heimleys at síggja úti á gøtunum, greiða tey frá.

Tað er ikki bert veðrið og samfelagið, ið er øðrvísi frá tí, vit kenna. Eisini skúlaskipanin er ein heilt onnur enn tann, vit kenna heimanífrá.

– Skúlaskipanin her er slett ikki sum tann, vit kenna heimaífrá. Tá tú kemur yvir her skal tú fyrst skrásetast sum næmingur og síðan at skráseta seg í teir klassarnar, tú skal hava. Senior næmingarnir sleppa at skráseta seg fyrst, síðan softmores og seinast juniors, greiða tey frá.

Meðan Pætur, Elsi og Joan eru í lestrarørindum á Hawaii, búgva tey til leigu. Men at leiga í Honolulu er ikki biligt, og tí deila nógv íbúðir fyri at spara pengar. Í løtuni deilir Pætur íbúð við 2 svenskar næmingar, meðan Elsi og Joan deila íbúð við 2 týskar næmingar.

### Halda jól á strondini

Tá vit tosaðu við tey, høvdu tey enn ikki fastlagt hvar og hvussu tey fara at halda jól.

– Vit verða væntandi nakrir internationalir næmingar, ið sláa okkum saman. Nøkur uppskot hava verið uppi og vent, um hvussu jólini skulu hátíðarhaldast, men sum sagt er einki endaliga planlagt enn. Hvør veit, kanska tey verða hildin á einari av teimum mongu lekkru strondunum, siga tey trý.

*Hvussu halda tey annars jól har og hvussu merkja tit tað?*

– Enn merkir man ikki meira til jólini enn at handlarnir hava pynta og ymiskar jólavørur eru komnar á handilshyllarnar. Ein orsøk til hetta er kanska, at jólini ikki er næsta høgtíðin, ið er á kalendaranum her. Thanksgiving er fyrst á skránni. Tað er eisini sera ymiskt hvussu man heldur jól her. Hetta kemst nokk av at her búgva sera nógvir ymiskir nationalitetir og hvør teirra hevur sínar siðir, greiða útisetarnir frá.

### Taka lesnaðin í størsta álvara

Hóast Hawaii kanska er mest kent fyri sól, strendur og surfing, er hetta ikki júst tað, tey nýta mestu tíðina til meðan tey eru har í lestrarørindum.

– Tá tú fortelur fyri fólki at tú lesur á Hawaii, verður tú beinanvegin